NØVN Í VIKUNI

60 ára føðingardagur og 60 ára merkisdagur

Dagurin er 4. februar 1942. Eg standi hjá mammu míni, sum er við at heingja klæðir upp á snórin oman fyri húsini hjá abbanum og ommuni. Sólin skínur, men nakað av mjørka hongur um fjallatopparnar. Brádliga hoyrist buldur og brak. Mamma mín sleppur klædnaplaggið, hon stendur við í hondunum, hyggur eystureftir og skuggar fyri eyguni. Eg skilji, at okkurt heilt óvanligt er á vási. Eg hyggi beint upp ímóti fjallinum og síggi ein flúgvara fara vestureftir. Alt hetta hendir í einum og mamma tekur meg í føvningin og rennur oman í kjallaran við mær, har vit so sita til alt er stilt av. Soleiðis byrjaði ein dramatiskur dagur, har 3 bumbur sprongdust uppi í bønum oman fyri Marknoyri, og fyri okkara viðkomandi kom dagurin at verða enn meira dramatiskur, sum leið út á seinnapartin, men lukkutíð endaði alt í øllum góðum og eg fekk tann lítlabeiggja, eg hevði ynskt mær.

Ein søguligur dagur í Vági og í dag 60 ár seinni, kann Óttar, sum beiggi mín kom at eita, halda sín 60 ára føðingardag.

Óttar er sonur Miu og Karl Olsen í Vági. Hann sleit sínar barnaskógvar í Toftalíð saman við brøðrum sínum Kára, sum var yngstur og býr á Argjum og mær, sum var elstur.

Eftir lokna skúlagongd í Vági, har hann gekk í flokki saman við so mætum monnum sum Árna Olafsson og Eivindi Weyhe og fleiri øðrum, fór Óttar í bankalæru í Føroya Banka í Havn. Skjótt gjørdist bankaverðin Óttari ov trong og fór hann til Danmarkar á Niels Brock, har hann tók hægri handilsskúlaprógv.

Væl uppdrigin í tí fría føroyska bygdarlívinum og við kunnleika til tað fría handilslívið hjá Johan Nolsøe á Marknoyri og seinni hjá Skipafelagnum á keiuni í Vági hjá somu fyritøku eins og hjá okkum sjálvum, tá ið pápi okkara yvirtók Skipafelagið her, so helt Óttar seg til tað fría vinnulívið og starvast í tí enn.

Óttar kom at starvast hjá Pihl & Søn eftir lokna útbúgving á Niels Brock fyrst niðri í Keypmannahavn eina tíð og síðani her í Føroyum í 17 ár.

Væl lýddur, sum hann var, kom hann at kenna nógv fólk runt alt Føroya land og tosar tú við eitt nú hvalbingar, ja, so verður spurt eftir Óttari og nógvir biðja heilsa honum. Tað einu tíðina arbeiddu nógvir hvalbingar hjá Pihl & Søn í Havn og aðra staðni í Føroyum við, eisini í Íslandi og í Grønlandi. Hetta komst kanska av, at Pihl & Søn gjørdi tann fyrsta tunnilin í Føroyum ímillum Tvøroyri og Hvalba, sum var liðugur í 1963. Jú vællýddur var Óttar.

Eyðkennislyndi í Óttari var arbeiðssemi, hjálpsemi, fastleiki og reiðiligheit, sum hann ikki hevur frá fremmandum. Vitugur, sum hann var, gekk hann ongantíð á akkord við sína samvitsku, men hevði sínar avgjørdu meiningar og førdi tær út í lívið. Tað, ið honum varð litið upp í hendi, røkti hann til fulnar, og tey minstu smáting fóru honum ongantíð aftur við borðinum, uttan at hann sum ein gløggur eygleiðari fylgdi teimum.

Hetta gav av at bíta, tá ið hann var settur sum stjóri fyri at endurreisa Norrønu, sum var komin á gravarbakkan. Tá ið hetta var fullført eftir nøkrum árum, og Norrøna var komin aftur á rættkjøl, varð hann biðin um at halda fram sum stjóri. Her komu hansara avgjørdu og reiðiligu meiningar til sjóndar, tí Óttar segði, at reiðaríið ikki var hansara, hann varð settur at røkja eina uppgávu og hon varð loyst til fulnar og so takkaði hann fyri seg. Soleiðis ger bert ein rættur og reiðiligur maður. Við meg segði hann, at hann ætlaði ikki at verða sitandi í stjórastólinum, har ein annar maður átti at sita, nevnliga tann sum stovnaði fyritøkuna.

Eftir heta røkti hann eisini stjórastarv eina tíð á Strandferðsluni og í nevndini hjá Landsstýrinum, sum hevði eftirlit við skipabyggingum, hevði hann eisini álitisstarv. Onkur kennir eisini hansara navn frá, at hann eina tíð var húsameklari.

Mangan verður sagt, at gamal kærleiki rustar ikki, og so var eisini her. Virksemið hjá Pihl & Søn í Føroyum minkaði burtur í einki, og tá ið henda stóra fyritøka í Danmark fekk frænir av, at Óttar hevði í so lítið at gera, sendi teir boð eftir honum beinanvegin.

Óttar tók av, tí honum dámar avbjóðingar, so hann situr í dag í høgum starvi hjá Pihl & Søn í Keypmannahavn. Óttar er giftur Bodil, sum er donsk, men tað er ikki hon, sum hevur fingið Óttar at flyta til Danmarkar, tí henni dámar sera væl í Føroyum.

Nú búgva tey í egnum húsum á Amager, har eisini sonurin Sørin eigur hús. Dótturin Gitte býr í Brussel, har hon hevur gott arbeiði í donsku umsitingini. Tann elsti sonurin Arni og tann yngsti Djóni búgva báðir í Havn.

Sum eitt kuriosum kann eg til seinast nevna, at 4. bumban, sum týski flúgvarin slepti niður umrødda dag, bert hevði grivið seg niður í jørðina, uttan at nakar hevði varnast hetta og uttan at bresta; men tá ið nýggja eldrasambýlið varð bygt omanfyri Marknoyri, varð hon funnin og undir ikki minni dramatiskum umstøðum varð hon flutt til Grótbrotið í Porkeri, har hon varð sprongd. Um kvøldið, sum bumban varð sprongd, fóru Virgar systkinabarnið og eg út í grótbrotið og funnu har eitt lítið petti av bumbuni, sum vit sendu Óttari til áminningar.

Góði bróður, okur her heima fara at ynskja tær, saman við tínum, ein góðan 60 ára føðingardag, við øllum góðum ynskjum fyri framtíðina. Húsini á Boðanesi eiga tit enn, so vit vóna, at tit einaferð um nøkur ár venda skútuni aftur ímóti Føroya landi. Góðan føðingardag.

Jákup

Føroyavinurin Oskar Jónsson farin í Harrans hendur

Mikudagin 23. januar komu deyðsboð úr Reykjavík. Oskar á Sjómansheiminum hjá Frelsunarherinum hevði lagt árarnar inn.

Sum ungur kom Oskar til Føroyar at starvast fyri Frelsunarherin. Hann var eisini leiðari fyri Sjómansheimið hjá Hjálpræðisherinum í Íslandi í mong ár. Tá kom hann at kenna nógvar føroyingar, sum gistu har.

Oskar og Emma tóku sær serliga gott av gestunum frá Føroyum. Oskar tosaði tað føroyska málið. Hann var eisini fleiri ár leiðari fyri Íslandi og Føroyar, sum eru egið umráði innan Frelsunarherin.

Hjúnini hava starvast mong ár í Danmark, men mest í Noregi. Tann síðsta uppgávan tey høvdu í aktivari tænastu fyri Frelsunarherin, var at stíla fyri arbeiðinum innan varðhaldsøkið. Hann hevði myndugleika at vitja allar fangar, hjálpa teimum við tí mesta, og hjálpa familjuni ið avvarðaði.

Við sínum góða hjartalag og smittandi góða hýri, var tað altíð gott at møta Oskar. Hann hevur strítt hitt góða stríð fyri sín Harra og Meistara. Hann fekk Falka-virðislønina frá íslendska forsetanum. Men tað sum gleddi Oskar mest, var at vita, at havn hansara stóð í Lívsins bók.

Vit eru mong, sum sakna og takka Oskar, sum var ein sannur Føroyavinur. Hann verður jarðaður frá Halgrímar kirkju týsdagin 5. februar.

Sajajo.

Tjóðveldislistin í Eysturoynni klárur

Tjóðveldisflokkurin er liðugur við sín valevnalista í Eysturoynni

POLITIKKUR
Heri á Rógvi

Tjóðveldisflokkurin er nú klárur við sínum valevnalista fyri Eysturoyar valdømi. Listin verður mannaður við hesum:

Torbjørn Jacobsen, Glyvrar, Andrea Eldevig, Fuglafjørður, Jóannes K. Eliasen, Leirvík, Hallur Ellingsgaard, Oyndarfjørður, Hallbjørg Hansen, Fuglafjørður, Súni í Hjøllum, Toftir, Olaf í Garði Joensen, Eiði, og Birgir Nónsgjógv, Innan Glyvur.

Um hesi er at siga, at øll – meira ella minni – eru kend í politiskum høpi. Hetta er tó fyrstu ferð, at Andrea Eldevig, Hallbjørg Hansen og Birgir Nónsgjógv stilla upp. Hesin síðst nevndi er púra óroyndur í politikki. Hallbjørg Hansen hevur verið býráðsformaður í Fuglafirði. Andrea Eldevig stillaði saman við Jóanes K. Eliasen og Tórbjørn Jacobsen upp til fólkatingsvalið seinast. Hini á listanum hava øll roynt at stilla upp áður.

Við seinasta løgtingsval, 30. apríl 1998, fekk Tjóðveldisflokkurin 1.177 atkvøður, og var flokkurin næststørstur á valinum. Hetta gav ein valdømisvaldan tingmann, og hesin gjørdist Signar á Brúnni. Hesin stillar ikki uppaftur hesaferð, men flokkurin hevur valt at stilla tvær kvinnur upp í Fuglafirði, har hann fekk ein stóran part av atkvøðunum. Tórbjørn Jacobsen, sum var nummar tvey á listanum við seinasta løgtingsval, hevur veruliga gjørt vart við seg seinastu árini, og hann er eisini at meta sum besta boðið upp á – í øllum førum – tann fyrstvalda valdømisvalda fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoynni. Tórbjørn fekk eitt sera gott úrslit á fólkatingsvalinum 20. november, har eisini eysturoyingar góvu honum tryggan stuðul.

Tjóðveldismenn meta, at talan er um ein sterkan og góðan valevnalista.

†

Kunngjørt verður, at okkara kæri

Jákup Olsen
(vanliga nevndur Jákup Zahle)
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnukvøldið 3. februar, 58 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin 8. februar kl. 13.00.

Annita og Hanus
Ingibjørg, Marjun og Karin

Ì hernað móti royking

À býráðsfundi í síðstu viku varð einmælt samtykt at fara undir eina roykiætlan, ið skal tryggja børnum og ungum í Klaksvík rættin til eitt roykfrítt umhvørvi

ROYKING
Ragnhild Ellingsgaard

Klaksvík: Fyri eini tíð síðani legði Heilsunevndin í Klaksvíkar Býráð fram eitt uppskot um at seta eina roykiverkætlan í gongd. Málið varð viðgjørt á býráðsfundi í seinastu viku, og varð einmælt samtykt at orða ein roykipolitik, ið skal tryggja børnum og ungum á skúlunum í Klaksvík rættin til eitt roykfrítt umhvørvi.

– Hetta fegnast vit sjálvandi stórliga um, sigur Rani Nolsøe, formaður í Heilsunevndini hjá Klaksvíkar Býráð.

– Í samgonguskjalinum hava vit sett okkum fyri, at okkara kommuna skal vera undangongukommuna á heilsuøkinum, og er roykiverkætlanin eitt týdningarmikið stig á hesi leið.

- Nú vit saman við skúlaunum hava sett fokus á skúlaungdómin, hevði verið ynskiligt, at politikkarnir gingu undan við at gera t.d. sjálvt byráðshúsið roykfrítt. Sostatt vóru politikkarnir ein tydningarmikil fyrimynd, leggur Rani Nolsøe afturat.

Klaksvíkar Býráð fer í hernað móti royking í fólkaskúlunum

Ov nógv ung roykja

Ofta hevur verið havt frammi, at ung í Føroyum samanborin við ung aðrastaðni í Norðurlondum roykja alt ov illa.

- Hetta hava vit í býráðnum og í skúlunum eisini tosað um, og av tí sama valdu vit at taka royking upp sum fyrsta mál í leiðini móti einum sjónligari heilsupolitikki, sigur Rani Nolsøe.

Hann sigur víðari, at endamálið er at fáa børnini at skilja, hvussu vandamikil royking er. Hetta kann bert av álvara verða gjørt í einum roykfríum umhvørvi.

Skúlarnir við í verkætlanini

Báðir fólkaskúlarnir eru við í roykiverkætlanini.

Skúlanir seta báðir 5.000 krónir av til ætlanina, meðan Klaksvíkar Býráð hevur sett 20.000 krónur til taks. Hesin peningur skal nýtast til upplýsandi tilfar og annað um vandarnar, ið kunnu standast av royking.

Verkætlanin skal orðast av einum arbeiðsbólki, sum lærarar, næmingar og limir í skúlastýrunum manna.

Rani Nolsøe situr sjálvur í hesum bólki sum umboð fyri Skúlastýrið, og væntar hann, at bólkurin longu fer til verka fyrst í komandi viku.

Skal strekkja yvir fleiri ár

- Hetta við roykiverkætlanini skal ikki skiljast sum eitt upplop, ið bert kemur at virka í eina stutta tíð, greiðir Rani frá.

- Vit vilja, at børn okkara skulu hava møguleika at trívast í einum góðum umhvørvi, og vilja vit stríðast fyri hesum. Ikki bert tað komandi vikuna, men eisini tey komandi árini, sigur Rani Nolsøe, formaður í Heilsunevndini hjá Klaksvíkar Býráð, at enda.

Grand Prix- tiltak í Klaksvík

Leygarkvøldið kunnu norðingar fylgja Pæturi við Keldu og hinum á stórskyggja afturvið einum serligum Grand Prix-døgurða

MENTAN
Ragnhild Ellingsgaard

Tað munnu vera mong, ið gleða seg til leygarkvøldið. Kanska serliga norðingar, og ikki minst klaksvíkingar.

Fólk, sum altíð hava fylgt við tí danska Grand Prixnum, og uttan iva eisini fólk, ið ongantíð áður hava fylgt við.

Orsøkin til hetta er Pætur við Keldu. Maðurin, ið alt Føroya land hevur hoyrt so nógv um ta seinastu tíðina.

Pætur við Keldu skal sum teim flestu kunnugt framføra sín egna sang á Grand Prixnum leygarkvøldið, og skal systir hansara Tóra eisini verða við sum kórsangari.

Pætur á stórskyggja

Leygarkvøldið bjóða Restaurant ShangHai og Barok øllum áhugaðum til eitt hugnakvøld, ið samband við at Grand Prixið fer av bakkastokki.

– Vit vilja geva klaksvíkingum møguleika fyri at vera saman hetta stóra kvøld, og tí eru vit farin undir hetta tiltak, frætta vit frá fyrireikarunum.

– Vit fara at leggja eina serliga Grand Prix-matarskrá tilrættis, og kunnu fólk so njóta ein leskiligan døgurða, meðan Grand Prixið verður vístá á trimum sjónvørpum í Restaurant ShangHai.

Á Barok fara vit at vísa alt Grand Prixið á stórskýggja, meðan barrin, umframt tær vanligu drykkjvørurnar, eisini fer at bjóða gestunum okkurt smærri ábit, greiða fyrireikararnir frá.

Klaksvíkingar spentir

– Vit vita, at fólk eru øgiliga spent uppá, hvussu Pætur fer at klára seg, og at mong fara at fylgja við í sjónvarpinum leygarkvøldið.

Men fyri summi kann stovan tykjast í so trong til eitt so stórt kvøld, og tí bjóða vit teimum ístaðin at koma her. Her er pláss fyri nógvum fólkum, og sjálvir eru vit eisini sera spentir uppá, hvussu alt fer at ganga hjá Pæturi, siga fyrireikararnir at enda.